## DAGSINS MEINING

# Sekur, ið at sær tekur

Formaður Tjóðveldisfloksins er vorðin í øðini um oddagrein í blaðnum 31. august og leggur okkum undir at reka hetz móti flokki hansara. Orsøkin er, at vit í oddagreinni vístu á, at pástandur Hoydals um, at føroyingar vóru til reiðar at góðtaka eina grønlendska loysn í undirgrundarmálinum er burtur úr vón og viti. Hetta tekur Hoydal okkum sera illa upp í grein í blaðnum í dag - hetta, at vit hava lýst pástand hansara um, at landsstýrið, sum sat tá undirgrundarmálið varð loyst, var til reiðar at góðtaka eina grønlendska loysn, og at hetta var at dálka minnið um Atla Dam.

Hvat hevur Høgni Hoydal so skrivað í greinini *Tá søgan er følsk, verður framtíðin til fals?* Hann skrivar orðarætt: *Tá fundurin við Schluter var í 1992, hevði landsstýrið millum annað í skjáttuni eitt føroyskt útspæl til at góðtaka eina grønlendska loysn - men Schluter tók teir á bóli.* Halgir W. Poulsen, ið var ráðgevi hjá landsstýrinum hetta mundið, hevur longu avsannað hendan pástand og víst á, at hetta er beinleiðis ósatt.

Hvat snýr henda hetz móti Tjóðveldisflokkinum seg so um? Jú, hetta snýr seg heilt einfalt um, at Høgni Hoydal í nevndu grein skuldsetur føroysku samráðingarfólkini 1992 fyri at ætla sær at góðtaka eina grønlendska loysn. Tað stendur svart upp á hvítt í grein hansara. Hesum kann hann ikki renna undan! Hesin pástandur er avsannaður og er sostatt ósannur. Øll vita, at ein grønlendsk loysn hevði verið beint í móti løgtingsins vilja. At skuldseta landsstýrið 1992 fyri at vilja góðtaka eina grønlendska loysn er ein grov og grundleys skuldseting móti hesum landsstýri. Atli Dam leiddi hetta landsstýrið, og er henda skuldseting tí ein ákæra móti einum manni, sum ikki fær vart seg, tí hann liggur í grøvini. Hetta er sera grovt og kann ikki góðtakast. At Atli ikki verður nevndur við navni er í hesum sambandi púra týdningarleyst. Hann hevði ovastu ábyrgdina, og hann var sum nakar identifiseraður við tær samráðingar, sum endaðu við eini fyri Føroyar góðari loysn. Við nevndu grein frátekur Hoydal eisini Atla Dam heiðurin fyri hesa frálíku loysn. Nú er hetta alt Schluteri fyri at takka!

Høgni Hoydal er við greini síni *Tá søgan er følsk, verður framtíðin til fals*, lopin framav. Hetta kann henda fyri sjálvt tey bestu, og hetta hendir tíverri eisini fyri Sosialin við hvørt. Tey hevði sømt honum betur at viðgingið sítt mistak og givið øllum teimum, sum hann leggur undir at hava ætlað at góðtaka loysn í undirgrundarmálinum, sum var móti tingsins vilja, eina umbering. Men hann velur heldur leiklutin sum offur - offur fyri hetz, ið Sosialsins móti flokki hansara. Her er als ikki talan um hetz. Vit hava bert víst á, at ákærur Hoydals móti landsstýrinum (herundir Atla Dam), sum bjargaði okkum undirgrundina, een einaferð eru pógvaðar at vera ósannar. Formaður Tjóðveldisfloksins reagerar so ógvusliga, at einum rennur orðatakið um, at sekur er hann, ið at sær tekur, til hugs.

Hetta er eitt fyri Høgna Hoydal syndarligt mál, tí hann hevur áður fingið at vita, at tann mynd hann gevur lesarunum av samráðingarstøðuni í 1992, er skeiv. Høgni Hoydal hevur nevniliga áður verið frammi við sama pástandi um grønlendska loysn, nevnuliga í grein 28.02.02: Tá varð hann væl og virðiliga settur upp á pláss av Atla Dam, sála, í viðmerking í blaðnum her tann 1. mars sama ár. Seinastu skuldsetingarnar um grønlendska loysn í 1992 eru tí settar fram móti betri vitan og so kann ein bert gita um, hvat endamálið er við slíkari skriving. Og so kann lesarin sjálvur døma um, hvørt hetta at átala slíka skriving er hetz móti heilum flokki ella ikki. Vit vilja so staðiliga vísa aftur, at vit reka hetz móti Tjóðveldisflokkinum, og flokkurin fær enn sum áður alt tað pláss í blaðnum, hann ynskir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Penganeyð

**Palli Dalsgaard**



Nú eru somu tíðindir at hoyra í Útvarpi og Sjónvarpi um, at halli á fíggjarlógini til næsta ár er so og so stórt. Er nakað annað at vænta? Væl eru tíðirnar so vánaligar beint nú, sum hugsast kann, men tað hevði staðið á fíggjarliga hjá okkum, um tíðirnar vóru muanndi betri enn ídag. Hvussu ár 2015 kemur at roynast vita vit tíbetur ikki, vit kunnu einans vóna tað besta. At selja fastar ognir fyri at yvirliva, tað ljóðar ikki væl, tað minnir okkum á orðafellið hjá kellingini um stokkuta varman.

Tað, ið undrar okkum mest, tá vit lurta eftir løgtingsmonnunum, líkamikið hvønn flokk teir hoyra til, so vilja teir allir sum ein hava fleiri útreiðslur, ikki eitt orð hoyrist frá nøkrum um sparsemi. Føroyar skulu uppí alt har onnur lond hava sína umboðan, kosta hvat tað kosta vil. Tíðin ið var tá undanfarna landsstýri sat, er ikki nú, nær hon kemur aftur, vit vita ikki, men tað verður neyvan í bræði. Tað var ein ævintýratíð, pengarnir streymaðu inn allar staðir, avlop omaná avlop, tá var gamaní at tosa um fullveldi, og halda seg verða sjálvbjargnan. Teir sum ráða fyri borgum í dag, verða noyddir til antin at lække livifótin í Føroyum munandi ella fara til Danmarkar at fáa blokkin aftur í tað støði hann var, tá hann varð minkaður, og prístalsreguleraðan.

# Gott eg ikki eri bøssi!

**Pauli Højgaard**

Hetta lesarabrævið er ognað Jógvani á Lakjuni, Jenis av Rana, onkel Geo og hinum fundamentalistunum í Føroyum.

Tit hava fyrr fingið meg at »krympa« tærnar, men hesaferð klári eg ikki bara at krympa!

Hvat í allari víðu verð halda tit tykkum vera? Leggja eftir einum minnilutabólki og døma tey niður og norð. Tey hava tað nóg ringt sum er. Skrivað stóð onkrastaðni, at tað var bert ein sum skuldi døma.

Enn eru nøkur samkynd, sum framvegis búleikast í Føroyum, ein stórur partur er rýmdur undan tykkum og øðrum, til Danmarkar og onnur lond, har liviligt er hjá øllum. Har blíva tey ikki forfylgd. Føroyar skal eitast at vera eitt demokratiskt land, har tú hevur loyvið at hava tína meining og siga hana. Skrivitalifrælsi. Eisini hevur tú loyvi til at trúgva tað, tú vilt, ella als ikki trúgva. Tað skal ongin koma og sláa nøkur fá fólk í høvdi við bíbliuni, og siga teimum at tey liva eitt ósømiligt lív eftir TYKKARA trúgv. Roynið tit og setið tykkum í teirra stað! Halda tit at tit eru góð medmenniskju og vísa góðan næstrakærleika á hendan hátt?

Kristindómurin, Islam, Hinduisman og aðrar religiónir eru lærusetningar og rætningslinjur, sum skulu hjálpa einum at liva sítt lív (les: sítt egna) so gott sum gjørligt. Og ikki til at finnast at øðrum og teirra máta at liva uppá. Hvør sigur at øll samkynd hava somu barnatrúgv sum tit? Og um so var, hevur tað onki við tykkum at gera. TIT verða als ikki noyddir til at fara í song við einum av tykkara egna kyni av teirri orsøk.

Landsins kosnu menn sita og skræða seg, spalta upp og spalta niður um nøkur ting, teir als ikki hava nakað við at gera. Hetta er ikki ein politiskur spurningur. Tað eru nøkur heilt onnur ting, fólkið hevur valt tykkum fyri. Vit koma ongantíð, sum tjóð víðari við hesum nalvaskoðandi hugburði. Hvat við at kjakast eitt sindur um EU, Ílegugransking, kunningartøkni, ella hvussu vit á skilabestan hátt stýra okkara kæra landi?

Til seinast, takk til Hans Paula Strøm og Løgmann fyri at ganga á odda og royna at føra Føroyar inn í 21. øld hesum viðvíkjandi.

# 525 fólk í Vágum mótmæla

Í Vágum hava fólk savnað inn undirskrivtir til tess at mótamæla, at felagið Se-Wave saman við SEV ætlar at byggja eitt alduorkuverk og ein veg út í Nìpu, sum er eitt av Føroya vakrastu náttúrøkjum.

- Hetta royndarverk fer ikki at geva meira enn ein Vindmylla, og hetta kemur at hava ein oyðandi ávirkan á allan heiðafuglin, sigur Gunnar Rasmussen Nattestad vegna stigtakararnar, sum hava sent bygdarráðnum og Friðingarnevndini í Vágum mótmælið.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.